# Byggja landingarmiðstøð á Tvøroyri

**Tvøroyrar kommuna hevur planerað grundøkið sunnanfyri flakavirkið og hevur givið prinsipielt byggiloyvi. – Enn er málið í stoypiskeiðini, sigur Gudmund Mortensen**



*– Vit hava bara eina uppboðssølu í Føroyum, og hon er á Toftum. Hitt eru landingarmiðstøðir, har Fiskamarknaðurin tekur sær av tí praktiska. Soleiðis verður væntandi eisini við landingarmiðstøðini á Tvøroyri, sigur John Nielsen, stjóri*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Fyrr í vár varð felagið, P/F Landingarmiðstøðin á Tvøroyri, stovnað.

John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya á Toftum, sigur, at tað eru skipini og vinnulívið í Suðuroynni og Fiskamarknaðurin, sum hava stovnað hetta felag og ætla at byggja eina landingarmiðstøð.

Felagið er tó ikki lýst enn.

– Tvøroyrar kommuna hevur givið prinsipielt byggiloyvi á einum øki sunnanfyri flakavirkið, har ætlanin er, at landingarmiðstøðin skal byggjast.

Enn er ikki endaliga avgreitt, hvør skal eiga bygningin, men í luftini liggur, at tað verður felagið, sum nú er stovnað.

– Onkur hevur tó bjóðað sær at byggja bygningin og leiga hann út til felagið, sum skal reka landingarmiðstøðina, men enn er hesin spurningurin ikki endaliga avgreiddur, sigur John, sum tó væntar, at tað verður felagið sjálvt, sum fer at eiga bygningin.

Hann vísir á, at arbeitt hevur verið við ætlanini um landingarmiðstøð allan vetur, men enn eru ikki øll viðurskifti fingin uppá pláss.

### Eingin tíðarætlan

Gudmund Mortensen á Tvøroyri, sum er ein av monnunum aftanfyri ætlanina, sigur, at eingin tíðarætlan fyriliggur enn, nær ætlaða virksemið á Tvøroyri kemur í gongd.

– Eg vil siga, at málið er enn í stoypiskeiðini, men arbeitt verður fram ímóti, at landingarmiðstøðin gerst veruleiki.

Hann vísir á, at hetta er eitt projekt, sum í fyrsta lagi skipini og vinnulívið í Suðuroy taka stig til, men ætlanin er, at Fiskamarknaður Føroya á Toftum skal umsita landingarmiðstøðina á Tvøroyri eins og í Vági, Sørvági og Klaksvík .

Felagið, har Gudmundur er stjóri, N. J. Mortensen, eigur trolararnar, Rasmus Effersøe og Rankan og garnaskipið, Nim.

### Bert ein uppboðssøla

John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya á Toftum, váttar, at tað verður Fiskamarknaðurin, sum ætlandi kemur at umsita landingarnar og søluna av fiskinum á Tvøroyri.

– Hetta verður á sama hátt sum eitt nú í Klaksvík. Har umsita vit bæði tann partin, sum seldur verður á uppboði og tann partin, sum virkini keypa beinleiðis frá skipunum.

Stjórin vísir á, at Fiskamarknaður Føroya hevur eina avtalu við Kósina um, at marknaðurin avgreiðir øll viðurskifti í sambandi við landingarnar – eisini, tá ið Kósin keypir fiskin beinleiðis frá skipunum.

– Eg haldi, at fólk hava lyndi til at blanda tingini saman. Vit hava bara eina uppboðssølu í Føroyum, og hon er á Toftum. Hitt eru landingarmiðstøðir, har Fiskamarknaðurin tekur sær av tí praktiska. Tískil er eingin uppboðssøla í Klaksvík, men ein landingarmiðstøð, sigur hann.

John endurtekur, at ein landingarmiðstøð tekur sær av at fáa fiskin uppá bryggjuna, meðan restin gongur fyri seg á skrivstovuni á Toftum.

### Heldur fram í Vági

Spurdur, hvussu verður við landingarmiðstøðini, sum er í Vági, sigur John, at hon heldur fram sum higartil.

– Endamálið við landingarmiðstøðini á Tvøroyri er í fyrsta lagi at fáa fatur á skipunum har á staðnum og teimum, sum eru heimahoyrandi í Hvalba. Miðstøðin í Vági tekur sær meira av útróðrarfiskinum, og tað fer hon framhaldandi at gera, sigur John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya á Toftum.

# Kona og børn tóku ímóti bátinum

NÝGGJUR BÁTUR
*Vilmund Jacobsen*

Ikki eru allir bátar líka stórir, sum koma til landið.

Seinasta hóskvøld var móttøka á bryggjuni í Leirvík, tá ið nýbygningarnir, Norðleivur og Fríðborg, komu til landið. Í mun til tey stóru skipini, vit flaggaðu fyri, eitt nú rækjuskipini, nótaskipini og ikki minst svartkjaftaskipini, eru nýggju leirvíkstrolararnir smáir. Men hóast tað munnu teir fara at roynast í fiskiskapi og manningarhýru, tá ið saman um kemur.

Og móttøkan í Leirvík var ikki í mun til støddina á skipunum; hon var nevniliga stórfingin við umleið 300 fólkum, bæði nær og fjar.

Tveir nýggir trolbátar – og ein stórur dagur í Leirvík.

### Kona og børn

Tíðliga friggjakvøldið sást nakað av fólki vera samankomið í Vágsbotni í Havn. Vit hugdu framvið við myndatólinum. Jú, ein 27 fóts glastrevjabátur var júst komin á Havnina, keyptur brúktur úr Noregi.

Vit fregnaðust, hvør eigarin var, men hann var ikki at finna. Uppi á bryggjuni stóð ein kona við tveimum smádreingjum, og vit skiltu skjótt, at hetta var kona eigaran.

Hon greiddi okkum frá, at maðurin, sum er á krabbaveiði í Grønlandi, hevði keypt bátin um Internetið, stutt áðrenn hann fór avstað. Og nú báturin kom heim úr Noregi við farmaskipi, var maðurin burturstaddur.

Konan hevði tó gott fólk at hjálpa sær. Ein vinmaður hjá manninum hevði siglt bátin saman við eldra soninum hjá eigaranum úr Hvalvík, har farmaskipið hevði sett bátin av og til Havnar.

Nakað av fólki nýtti høvi at hyggja umborð og konan, sum saman við yngra soninum var komin oman í Vágsbotn at taka ímóti, hevði keypt karamellur og sodavatn, sum børn og vaksin kundu fáa sær.

Maðurin, sum sigldi bátin úr Hvalvík til Havnar, segði seg hava sæð hópin av lomvigu á vegnum suðureftir gjøgnum Sundalagið og á Tangafirði.

# Kassatrupulleikin er helst av

**– Vit vóru so sperdir, tá ið ringast stóð til við kassum, at vit umhugsaðu at lata aftur, sigur John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya**



*– Kassaskipanin er ein góð skipan, sigur John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hevur gjørt nakað burtur úr kassatørvinum, sum serliga var í vár, tá ið nógvur fiskur kom uppá land, og norðhavsróðurin var í hæddini.

Í seinastu grein okkara um kassatørvin, segði Kári í Garði, stjóri á Kassamiðstøðini, at »skal Smyril altíð verða nóg stórur, skal hann vera ógvuliga stórur«.

Og soleiðis helt hann eisini, at støðan var við kassaskipanini og tørvinum á kassum og kørum. Kári helt, at nóg mikið av kassum og kørum er í landinum.

Tá ið Sosialurin spurdi hann, um tørvurin hevði nakað við bíleggingina av kassum at gera, segði Kári, at Kassamiðstøðin fær teir kassar og kør, sum hon bíleggur.

### Broytt skipan

John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya, sigur, at marknaðurin hevði stórar trupulleikar í vár við kassum og kørum.

– Kári avgjørdi at broyta kassaskipanina. Hann vildi hava teir smáu kassarnar út og tey lágu kørini inn. Tí steðgaði Kassamiðstøðin við at keypa tey gomlu kørini. Miðstøðin bílegði ikki tey lágu kørini fyrr enn í november, og tí gekk so long tíð at fáa kørini heim. John veit at siga, at Kassamiðstøðin keypir kørini úr Íslandi, og tað tekur langa tíð hjá íslendingum at avgreiða so stórar bíleggingar.

– Eg haldi, at bíleggingarnar skuldu farið avstað fyrr; tá hevði trupulleikin ikki blivið so stórur, sigur hann

### Sperdir

Stjórin á Fiskamarknaðinum ásannar, at tey høvdu ein veldugan trupulleika í vár, og eina tíð umhugsaði marknaðurin at lata aftur, tí næstan ómøguligt var at avgreiða skipini.

– Ákoyringarnar vóru nógvar, og Fiskamarknaðurin fekk skuldina fyri, at alt ikki gekk, sum tað skuldi, sigur John, sum heldur, at trupulleikin nú er loystur. Trýstið er ikki so stórt longur, og hvørja viku koma nýggj kør heim úr Íslandi.

John Nielsen heldur annars, at hugskotið við kassaskipanini er gott, og torført hevði verið at fingið eina betri skipan.

# ítróttur

Nr. 94 • mikudagur • 22. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hugburðsbroyting krevst



*- Hyggur tú at aldursbýtinum, so er tað bara Ingi, sum er føddur í '69, meðan restin av hópinum eru leikarar, sum eru føddir í '75 ella seinni, sigur Lars um hópin, sum hann heldur er sera spennandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Frank Petersen syrgir fyri, at venjingarnar verða gjørdar á rættan hátt. Her er tað Hans Áki Dal-Christiansen, sum fær nakrar leiðbeiningar, og Kristian Madsen tykist eisini at lurta*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í nógvar mátar kann landsliðsvenjarin í hondbólti tykjast at hava rættiliga kontantar fatanir av, hvussu venjingarnar skulu fara fram, men sjálvur heldur hann hetta vera neyðugt, at tað skal eydnast at skapa neyðugu hugburðsbroytingina á landsliðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eitt hitt fyrsta, sum landsliðsvenjarin hjá A-landsliðnum í manshondbólti, Lars Nedergaard, gjørdi, tá hann varð settur í starvið, var at boða frá, at kropsliga venjingarstøðan hjá landsliðsleikarunum skuldi betrast.

At hjálpa sær við hesum hevði hann fingið Frank Petersen, sum eisini hevur verið knýttur at danska hondbóltslandsliðnum, og saman løgdu teir eina skrá, sum skuldi tryggja, at venjingarstøðan hjá leikarunum skuldi betrast.

### Verða testaðir

Um vikuskiftið vóru teir báðir venjararnir aftur í Føroyum. Vant varð bæði leygar- og sunnudagin, og var talan fyrst og fremst um sonevndar testir, har venjararnir kundu fáa sjón fyri søgn, hvørt venjingarskráin hevði riggað eftir ætlan.

Tá vit sunnudagin fingu orð á Lars Nedergaard, tóktist tað eisini vera ein væl nøgdur venjari, sum vit fingu orðið á.

- Nú er tað Frank, sum stendur fyri kropsligu royndunum, og tær eru ikki lidnar enn, so tað fái eg ikki sagt so nógv um. Rennitestirnar gjørdu vit tó í gjár, og yvir høvur var úrslitið av hesum nøktandi, sigur Lars, tá vit spyrja hann um úrslitið, sum er komið higartil.

- Fyri einstakar av leikarunum er tó galdandi, at teir ikki vóru í teirri venjingarstøðu, sum vit høvdu vónað. Teir hava vit so fingið okkum eitt álvarsligt prát við, og nú hava teir so fýra vikur til at prógva, at teir vilja geva seg nóg nógv. Vit hava so eina nýggja test um ein mánað, og tá fellur hamarin, um teir ikki standa seg nóg væl.

### Eingin neyðsemja

Tað skilst alt fyri eitt, at tað er ein hampuliga kontantur venjari, sum HSF hevur sett at taka sær av starvinum. Orðini um at hamarin fellur, um leikararnir ikki eru nóg væl fyri, verða søgd uttan so mikið sum ein blunk, og Lars leggur eisini dent á, at fyri at vera á landsliðnum, so skulu leikararnir eisini geva tað, sum krevst.

- Eg havi alla tíðina sagt, at eg bara vil hava teir leikarar, sum vilja spæla á landsliðnum. Hetta er eisini fremsta orsøkin til, at hópurin í dag er skorin niður úr teimum upprunaligu 22 í 18. Har vóru nakrir leikarar, sum ikki vildu offra nóg nógv til hetta. Antin tí teir tóku aðrar ítróttagreinir framum, ella tí viljin til at venja so nógv ikki var til staðar. Tað er so eisini í lagi, at teir hava givið boð um hetta, og tað er sum so í besta forstáilsi, at hesir eru farnir úr hópinum.

- Tað er jú bara soleiðis í dag, at tú kanst ikki íðka ítrótt á elitustøði, um tú roynir at vera við allastaðni. Skulu vit hava nakran møguleika í altjóða høpi, so er neyðugt, at leikararnir eru í gongd 12 mánaðir um árið, og tað sampakkar ikki við, at tú samstundis spælir eitt fótbólt í bestu deildini. Somikið einfalt er tað. Tað merkir so kanska eisini, at tað ikki eru 18 teir bestu leikararnir í landinum, sum eru á landsliðnum, men hinvegin havi eg 18 leikarar, sum vilja vera á landsliðnum, og tað hevur nógv størri týdning fyri meg. Sjálvandi taka vit atlit til, at talan er um áhugaleikarar, men viðvíkjandi hugburðinum til venjingina verða ongar neyðsemjur gjørdar.

### Spennandi hópur

Um hópin, sum hann hevur at arbeiða við, sigur Lars annars, at hann heldur talan vera um eitt sera spennandi lið.

- Hyggur tú at aldursbýtinum, so er tað bara Ingi, sum er føddur í '69, meðan restin av hópinum eru leikarar, sum eru føddir í '75 ella seinni. Hetta ger eisini, at vit kunnu arbeiða meira framrættað, og tað er kanska eisini neyðugt, tí fyri at kunna vera við, so mugu vit skapa eina hugburðsbroyting.

- Vit skulu burtur frá hugsanini um, at vit ongan møguleika hava at spæla móti teimum stóru. Tað kann væl vera, at vit ikki hava nakran veruligan møguleika at gera okkum galdandi, men vit skulu ikki góðtaka eitt tap, bara tí mótstøðan er sterk. At broyta hetta fer at taka tíð, og úrslitið av tí sæst helst heldur ikki fyrr enn um eini tvey ár, men tað er so tann vegin, sum vit ætla okkum, sigur hann.

### Ikki hækkað

Lars Nedergaard er annars ikki ókunnugur við føroyskan hondbólt. Frá 1992 til 1995 hevði hann høvuðsábyrgdina av hondbóltinum í Vestmanna, og tí er hann kanska eisini førur fyri at siga nakað um, hvørt støðið í heimligu kappingini hevur flutt seg.

- Eg vil siga tað soleiðis, at støðið er ikki hækkað. Kanska er spælið betri, men hinvegin eru nógvir útlendingar við í dag, og tekur tú hesar burtur, so ivist eg í, um spælið er batnað.

- Ikki tí. Eg havi einki ímóti, at útlendskir leikarar koma í føroyskan hondbólt, og sum útgangspunkt skuldi hetta bara verið gott. Men tað skal ikki vera soleiðis, at ein ungur evnaríkur leikari situr á beinkinum, tí ein útlendingur er á hansara plássið. Tá verður tað ikki serliga mennandi.

- Hinvegin dugi eg væl at síggja, at venjararnir ikki altíð hava ráð at hugsa soleiðis. Hjá teimum er altíð eitt trýst um úrslit, men vit hava í øllum førum havt ein sera góðan dialog við venjararnar, og vónandi kann hesin halda fram, soleiðis at vit í felag røkka tí, sum er best fyri føroyskan hondbólt, sigur Lars Nedergaard at enda, áðrenn hann aftur fer inn í venjingarhølini.